## Jaguar má fáa lán



Fyrrakvøldið var fundur millum bretskar myndugleikar og tey, sum eiga bilverksmiðjuna Jaguar. Tað skrivar blaðið Telegraph. Jaguar var fyrr partur av amerikonsku fyritøkuni Ford Premier Auto Group, var bleiv selt tí indiska felagnum Tata Motors seinasta summar. Eigaraskiftið hevur tó ikki hjálpt Jaguar stórvegis, og seinastu tíðina hevur felagið tingast við stjórnina um at sleppa at læna hálva aðru milliard krónur. Sum skilst er stjórnin sinnað at ganga umbønini á møti undir ávísum treytum, og Telegraph væntar, at ein semja verður undirskrivað í hesari vikuni.

## Handlar selja nógvan heilivág

Síðani Fólkatingið gav teimum donsku handlunum loyvi til at selja ávís sløg av heilivági, er sølan vaksin støðugt, og nýggj tøl vísa nú, at handlarnir hava fingið 25 prosent av umsetninginum á økinum. Eitt nú selja handlarnir so nógv tyggigummi og plástur, sum skulu fáa fólk at leggja av at roykja, at teir hava 58 prosent av hesum marknaðinum. Síðani 2001 hava handlarnir í Danmark havt loyvi til at selja millum annað høvuðpínutablettir, hálstablettir, næsasprœn og ymiskt, sum skal fáa fólk at leggja sigarettirnar frá sær. Sambært einari uppgerð hjá myndugleikunum seldu handlarnir í fjør heilivág fyri 326 milliónir krónur.

# Norðborg aftur av øðrum túri

**Seinastu dagarnar hava Norðborg og Fagraberg partrolað eftir makreli í samstarvi við Havstovuna og veiðan, sum skipini hava fingið, er virkað umborð á nýggja verksmiðjuskipinum Norðborg**



*Tað sæst næstan ikki á skipinum, at eini 1500 tons eru innanborða*

*Mynd: Dávur Winther*

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hetta man vera fyrstu ferð í okkara fiskivinnusøgu, at makrelur úr føroyskum sjógvi er skráskorin umborð á føroyskum skipi.

Norðborg og Fagraberg eru júst komnir aftur av túri, har skipini í samstarvi við Havstovuna hava fiskað makrel við sild sum hjáveiði.

Jón Rasmussen hevur verið skipari við Norðborg hendan túrin, og tá vit høvdu hann í telefonini í morgun, stóð hann við kranan, meðan skipið legði frystu veiðina upp í Ánunum.

\- Samlaða veiðan av frystum er 1230 tons, harav umleið 40% er sildafløk og eini 60% skráskorin makrelur. Aftrat hesum hava vit umleið 200 tons av mjøli, sum verða løgd upp til Havsbrún í Fuglafirði.

Skiparin sigur, at øll veiðan hendan túrin hevur verið í føroyskum sjógvi, og samstarvið við Havstovuna hevur havt til endamáls at staðfesta makrel í føroyskum sjógvi.

Sum skilst, hevur veiðan hjá skipunum verið góð, og stundum noyddust tey at leggja stilt og framleiða undan.

\- Eg fái ikki so væl tosað í løtuni, nú vit eru í holt við at landa, men tit eru vælkomin at ringja aftur seinni í dag, segði Jón Rasmussen, skipari.

### Fyrstu ferð

Kristian Martin Rasmussen sigur, at øll veiðan, sum Norðborg og Fagraberg fingu á hesum túri, varð virkað umborð á Norðborg.

\- Veiðan var góð, men við tað, at sild var uppi í makrelinum, hildu vit vera best, at øll veiðan kom umborð á Norðborg til skiljingar og virkingar.

Hann heldur, at hetta er fyrstu ferð, at makrelur úr føroyskum sjógvi soleiðis er virkaður umborð á føroyskum skipi.

Kristian Martin vísir á, at nú Norðborg enn verður royndarkoyrd, eru einir 30 mans við skipinum, men tá alt kemur at virka, sum tað skal, fer manningartalið at liggja millum 26 og 28.

\- Enn eru ymiskar justeringar og tillagingar, sum skulu gerast so hvørt, sum vit detta á ymiskt, ið kundi verið eitt sindur øðrvísi, leggur hann aftrat.

Hetta er annar túrurin hjá nýggju og stásiligu Norðborg, og hin fyrra túrin hevði skipið umleið 1000 tons av sildaflaki. Eitt sløð var av svartkjafti og makreli, sum teir heilfrystu umborð.

### Aftur á sild

Kristian Martin Rasmussen sigur, at skipið fer avstað aftur longu í morgin, og tá verður aftur farið á sildaveiði.

Gamalt var, at sildatíðin byrjaði eftir ólavsøku, og tá skuldi sildin ikki verið so bleyt longur.

Reiðarin væntar, at skipið verður á sild tað mesta av hesum árinum, men heldur, at nakað eisini verður veitt av makreli, sum tíðin gongur.

Tá Norðborg kom aftur av túri í gjár, var Kristian Martin Rasmussen sjálvur saman við abbabørnum á bryggjuni og tók ímóti endanum.



*Kristian Martin Rasmussen saman við abbabørnum á veg umborð á Norðborg*

*Mynd: Dávur Winther*



# Til leigu

Handilsbygningur á Argjum til leigu. Kann nýtast samlað ella sum fleiri leigumál.

Uml. 500 fermetrar.

Ring og spyr nærri.

**Sp/f Vestur tlf. 23 30 60**

# Misti fiskiloyvi í ein mánaða

BROT

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað kemur at kosta reiðarínum hjá djúpvatnstrolaranum Steintóri í Hvalba dýrt, at skiparin á seinasta túri loyvdi sær at snøra trolposan, sum teir verður rópt á fakmáli.

Tá vaktar-og hjálparskipið Brimil kom fram á trolaran á eystara kanti av Munkagrunninum uppundir endan av seinastu viku, vísti tað seg, at skiparin hevði ein annan posa við smærri meskum innan í trolposanum.

Brimil kom á Havnina við Steintóri um 10-tíðina seinasta fríggjamorgum og sektin, sum skiparin fekk fyri hetta brot á fiskiveiðireglurnar, er rættiliga stór.

Tá tú snørir trolposan, sum tað verður rópt, er hetta sambært fiskiveiðimyndugleikunum tilætlað brot, sum eigur at revsast hart.

Inndrigin reiðskapur og veiða hjá Steintóri hendan túrin hevur eitt virði av 403.000 krónum, og harafrat fekk skiparin 80.000 krónur í bót.

Aftrat hesum kann Fiskiveiðieftirlitið sambært heimildum í lógini um vinnuligan fiskiskap taka fiskiloyvi frá skipinum í fýra vikur.

Sektaruppskotið, sum skiparin á djúpvatnstrolaranum góðtók í rættinum umframt mista veiðitíðin, kann gerast dýr fyri djúpvatnstrolaran úr Hvalba, sum nú noyðist at liggja bundin við bryggju næstu fýra vikurnar – frá seinasta fríggjakvøldið at rokna.

Samlaði kostnaðurin av ólógligu veiðini hjá Steintóri er tískil 483.000 krónur umframt fýra vikur veiðibann.